B68–TB 6–0 (4–0):

# Ættarliðsskifti á Toftum og Tvøroyri

**Nýggja B68 liðið fekk fýra mál, eftir at tvørámenn høvdu mist ein mann**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

B68 er framvegis væl við í kappingini um tey átta plássini í fjórðingsfinaluni í steypakappingini. Tað er TB ikki. Nú tað resta tvey umfør í bólkaspælinum bendir alt á, at teir fara at taka sær av aftasta plássinum.

Hesin veruleikin man ikki pína so nógv á Sevmýri. Har arbeiða teir við at samanspæla eitt lið, og tá hevur tað størsta týdningin, at liðið verður væl fyri, tá ið tað verður farið undir landskappingina.

Á Svangaskarði vóru veteranarnir á TB liðnum umframt jugoslaviska Vladimir Matijevic spælandi venjarin, Jón Johannesen, miðvallarin Einar Petersen og framrættaði Dan Mortensen, sum tey seinnu árini hevur verið mest eyðsýndi TB spælarin. At hann noyddist skaddur av vøllinum, tá ið fyrra umfarið var 27 minuttir gamalt var sjálvandi ein smeitur.

Millum ungu menninar vóru Rasmus Nolsøe, sum er komin aftur úr Brøndby, har hann royndi seg í heyst, og Allan Smedemark, sum er sonur Poul Erik, ið var ein av stóru stuðlunum, tá ið TB í 1976 vann FM.

Í 51. minutti varð Kim Roest rikin av vøllinum, eftir at hann við hondini hevði tikið bóltin uttanfyri brotsteigin. Dómarin hevði tveir minuttir frammanundan givið sama spælara gula kortið, men sambært dómaraseðilin metti hann hetta seinna brotið so mikið álvarsligt, at hann vísti beinleiðis reytt kort.

### Lætt spæl

Hjá B68 vóru Øssur Hansen og Hans Fróði Hansen ikki við. Tann fyrri var skaddur, og tann seinni var leikbannaður. Bogi Petersen var í miðverjuni, har hann ikki hevur roynt seg áður (higartil hevur hann verið miðvallari og vongverji), og á høgra vongverja var Jóhan Dávur Højgaard, sum ikki hevur verið á besta liðnum áður. Fótbóltsevnini hevur hann ikki frá fremmandum. Hann er sonur Aksel Højgaard.

Í 3. minutti setti Súni Fríði Johannesen hol á, eftir innlegg frá Kristiani Poulsen, sum við góðari ferð hevði sneitt framvið fleiri mótstøðumonnum.

Níggju minuttir seinni økti Jóhan Petur Poulsen. Hegnisliga lyfti hann upp um Jónas Johannesen, sum kom út úr TB málinum.

Eftir at TB var vorðið undirmannað, vóru eftiransingarnar sera leysar. B68 trýsti, og tað mesta gekk fyri seg í og frammanfyri brotsteigin. Fróði Benjaminsen stútaði til 3–0, eftir frísparksinnleggið í sambandi við útvísingina. Súni Fríði Johannesen átti síðsta fótin, tá ið B68 økti til 4–0, so var tað Øssur Jacobsen sum úr vinstru smekkaði í handara síðunetið, og ein av ungu monnunum, Kristian Anton Andreasen, sum var komin á vøllin tjúgu minuttir frammanundan, syrgdi fyri tennisúrslitinum, tá ið hann í næstsíðsta minutti sneiddi framvið málverjanum, áðrenn hann trillaði bóltin í tóma málið.

Ove Magnussen, sum í fjør var á U–17 landsliðnum, var á B68 liðnum síðstu tjúgu minuttirnar. Um ikki fyrstu ferð so var hetta í hvussu so er ein av fyrstu ferðunum, at hann fekk møguleikan á besta liðnum.

### Dysturin í tølum

**B68–TB 6–0 (4–0)**
1–0: Súni Fríði Johannesen 3.
2–0: Jóhan Petur Poulsen 12.
3–0: Fróði Benjaminsen 51.
4–0: Súni Fríði Johannesen 56.
5–0: Øssur Jacobsen 64.
6–0: Kristian Anton Andreasen 89.
Reytt kort: Kim Roest, TB, 51.
Dómari: Páll Augustinussen
B68: Albert Sævarson – Jóhan Dávur Højgaard, Dánial Hansen, Bogi Petersen, Mannbjørn Nesá – Kristian Poulsen, Jan Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Jacobsen – Súni Fríði Johannesen, Jóhan Petur Poulsen
TB: Jónas Johannesen – Allan Smedemark, Kim Roest, Vladimir Matijevic, Jens R. Sørensen, Andre Dalfoss, Einar Petersen, Dan Mortensen, Rasmus Nolsøe, Jón Johannesen, Kai Roest






FS Vágar–NSÍ 2–1 (1–1):

# FSV hevur gott tak á NSÍ

**Mótsatt í Runavík fyri trimum vikum síðani eydnaðist tað hesa ferð vágamonnum at halda tørn um leiðsluna**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

FS Vágar hevur ofta sett NSÍ grá hár í høvdið. Fleiri ferðir hevur NSÍ verið illa fyri ímóti FS Vágum, men so hava teir kortini komið sær úr vandastøðuni. Soleiðis var ikki leygardagin í Miðvági. FS Vágar legði bragdliga fyri, teir komu á odda beinanvegin, og hóast NSÍ dygst undan hvíldini javnaði, so var FSV eisini í 2. hálvleiki omaná, og bæði úr Runavík og vestan úr Vágum ljóðar, at tað var uppiborið, at teir vunnu 2–1. Sigursmálið fingu teir stutt eftir hvíldina.

Hjá NSÍ var tað handikapp, at Gert Langgaard (burturstaddur) og Helgi L. Petersen (skaddur) ikki vóru við. Men eitt lið, sum hevur steypasigurin og silvurkrónur í FM kappingini at verja og sum skal luttaka í Europa Cup eigur at megna, at tveir stuðulsspælarar eru burtur frá.

Vágamenn spældu fyri lívinum í steypakappingini. Teir vóru væl upplagdir, ansaðu mótstøðumonnunum væl, og teir spældu seg til væl fleiri møguleikar enn mótstøðumenninir. Eitt nú var Clayton tvær ferðir einsamallur við Jens Martini Knudsen, sum bjargaði eina ferð, meðan hin royndin fór við síðuna av málinum.

### Málini

FS Vágar setti hol á, tá ið fýra minuttir vóru farnir. Støðan kendist eitt sindur undarlig. Eftir langa framlegging tóktist verjan hava tak á, men bólturin sigldi kortini framum miðverjuna, og so var Clayton Soares ikki seinur at takka fyri.

Tá ið Sonni L. Petersen javnaði til 1–1, var tað eftir uppspæl í vinstru. Jónstein Petersen legði innfyri, og Sonni var fyrstur á við nærra stólpan.

Sigursmálið skoraði Eyðfinn Fjalsbak, og tað var eitt sindur heppið. Frísparksroynd tók so mikið nógv í verjuspælara, at Jens Martin Knudsen, sum enn eina ferð var sera hollur hjá NSÍ, var so mikið snýttur, at hann ongan møguleika hevði at bjarga.

FS Vágar livir framvegis í vónini um at røkka fjórðingsfinaluni. Hetta var fyrsta ferðin, at NSÍ misti stig. Teir hava tryggjað sær rættin at halda fram í steypakappingini og harvið at arbeiða víðari uppá at verja finalusigurin frá í fjør.

### FS Vágar–NSÍ 2–1 (1–1)

1–0: Clayton Soares
1–1: Sonni L. Petersen
2–1: Eyðfinn Fjalsbak
FSV: Jákup Joensen – Sjúrður Ellefsen, Jóhannis Joensen, Vlad Osipov, Silva Braga – Eyfinn Fjalsbak, Ruslan Screlea, Jens Erik Rasmussen, Jack Johansen – Bjarni Prior, Clayton Soares
FS Vágar: Jakup Joensen – Sjúrður Ellefsen, Jóhannis Joensen, Albert Ari Thomassen, Clayton Braga – Jack Johansen, Ruslan Screlea, Jens Erik Rasmussen, Vlad Osipov – Clayton Soares, Eyðfinn Fjalsbak



VÍF-StÍF 22-28 (11-13):

# StÍF var bara betri

**Strandingar eru aftur føroyameistarar í manshondbólti. Hesum syrgdi teir fyri, tá teir vunnu sannførandi á VÍF í seinasta umfarinum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Meistarar. Rópini vóru ikki at misskilja, tá dysturin var liðugur, og tað var staðfest, at StÍF er ebsta liðið í manshondbólti í 2003*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Karmarnir vóru júst so, sum teir eiga at vera. Longu undan kvinnudystinum vóru flestu sitiplássini í høllini í Vestmanna upptikin, og tá mansdysturin byrjaði, var ilt at kroysta meira fólk inn enn tað sama.

Í alt mundi talið av áskoðarum fara at tátta upp ímóti teimum túsund, og frá fyrsta bríksli var sjónligt, at her stóð nakað væl meira enn tað vanliga ger upp á spæl. Longu fyrstu málini vórðu feirað í stórum stíli, sum var hvørt tað einasta mál avgerandi. Og tað kundi tað eisini væl verða.

Nervarnir og týdningurin av dystinum vóru sjálvandi nakað, sum hevði hug at sníkja seg inn á leikararnar fyrstu løtuna, soleiðis at spælið ikki gjørdist heilt so flótandi, sum hesi liðini annars eru før fyri.

Men strandingar vóru fyrstir at rysta hetta av sær. Ella í øllum førum tveir av leikarunum hjá StÍF. Marian Cirloganescu hótti eina løtu við at taka alt, sum vestmenningar tveittu at honum. Líka mikið hvussu skotið varð, so fekk hann vart fyri, og í hinum endanum tjóvstartaði ungi Sveinur Justinussen. Bæði við fríspælingum til viðleikarar, og ikki minst við drønandi hørðu skotum sínum, sum lótu Eli Müller verjuleysan í málinum.

Tá tað er sagt, so skal eisini leggjast afturat, at VÍF als ikki fekk sítt verjuspæl at koyra fyrstu longu løtuna. Tað var sum vóru leikararnir bundnir inni at strikuni í 6-0 verjuni, og við skjúttunum, sum StÍF hevur á bakplássunum, sigur tað seg sjálvt, at hetta kundi ikki halda.

Ein glott var tó at hóma seinasta korterið hjá heimaliðnum. StÍF hevði tá annars vunnið sær eina hampuliga leiðslu, men spakuliga kom VÍF aftur. Við at skifta verjuna til 5-1, har Johnny hálvgum skuggaði Costin Dumitrescu úr spælinum hjá StÍF, fingu vestmenningar bremsa álopsspælinum hjá gestunum, og so var at toga hinvegin.

Úr 4-11 broyttist støðan til 11-12, áðrenn strandingar beint undan steðginum aftur øktu til tvey mál.

Í hinum dystunum millum VÍF og StÍF hevur tað ofta verið soleiðis, at alt er avgjørt eftir lítlari løtu í seinna hálvleiki. Og soleiðis varð eisini her.



*Allan dystin hevði StÍF verjan sera gott tak á VÍF, har skjúttarnir á liðnum ongan tíð komu til sín rætt*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir seks minuttum høvdu strandingar høgt bóltin í kassan fimm ferðir, og so skuldi tað alla tíðina verða strævið hjá VÍF. Og teir megnaðu heldur ongan tíð at koma afturíaftur.

Vandamiklu skjúttarnir hjá liðnum sluppu næstan ikki framat. Partvíst tí verjan hjá strandingum stóð seg sera væl, og partvíst tí álopsspælið hjá VÍF ikki hekk saman. Mest sum hvørja ferð vórðu álopsroyndirnar endaðar við gjøgnumbrotsroyndum frá einstaklingum, og mest sum hvørja ferð rendi leikarin í gjøgnumbroti seg inn í minst tveir strandingar. At að eisini skudu ganga 50 minuttir, áðrenn Áki Olsen fekk fyrsta málið, sigur helst nakað um, hvussu væl strandaverjan riggaði, og tó at Áki eftir hetta veruliga fór ígongd, so var »to little to late« hjá VÍF.

Strandingar hinvegin fagnaðust. Áskoðarar teirr mundu fylla góðan fjórðing av høllini, men har hoyrdist einki annað. Og tá sigurin so var vísur, streymaðu fólk inn á vøllin. Í einum stórum ringi sungu tey um gull, føroyameistarar og tað, sum har til hoyrir, og eingin ivi var um ,at tey áttu hetta uppiborið.

Gjøgnum alt árið hevur liðið talst millum tey bestu, og nú tað veruliga stóð á, sýndu teir formatið. Ikki minst er tað hugkveikjandi, hvussu lágur miðalaldurin á liðnum er. Av heimligu leikarunum er tað helst bara Artur, sum kann roknast at fella fyri aldursmarkinum innan alt ov nógv ár. Hinir eru fyri tað mesta leikarar, sum kunnu gerast enn betri, og í so máta er einki at ivast í, at oddastøðan hjá StÍF í føroyskum manshondbólti eisini fer at standa við. Teir verða kanska ikki meistarar á hvørjum ári, men tilfeingið í felagnum er somikið ríkt, at teir heilt víst fara at verða har, sum tað gongur fyri seg.

### Dysturin í tølum

**VÍF-StÍF 22-28 (11-13)**
Málskjúttar:
VÍF: Áki G. Olsen 6(2), Áki Olsen 5, Johnny Joensen 2(1), John Zachariasen 2, Agnar Joensen 2, Ingi Olsen 2, Rógvi Nielsen 1, Petur Frank Joensen 1, Daniel Rápa 1
StÍF: Alexandur Johansen 9(3), Costin Duimitrescu 5(2), Sveinur Justinussen 5, Bent Djurhuus 3, Artur Johansen 3, Kristjan Petursson 1, Borgar Danielsen 1
Brotskøst: VÍF 7, StÍF 7
Útvísingar: VÍF 2, StÍF 2
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Valdu at leggja eina linju, har leikararnir fingu loyvi til at brúka kropsligu styrkina, og fyri intensitetin í dystinum var hetta at fegnast um.